# Grønlendskur gysari

**FILMUR** **Lagt er upp til ein góðan og gamaldags ræðufilm, tá grønlendska filmsfelagið Tumit Production vísir nýggjasta film sín – Qaqqat Alanngui – Skuggar í fjallinum seinni í ár.**

Snorri Brend

Tað er 33 ára gamli Malik Kleist sum hevur leikstjórnað filminum. Malik er annars kendur sum forsangari í grønlendska kultbólkinum Chilli Friday.

Seinnu árini er tíðin tó mest farin til framleiðslu av filmum í egna felagi hansara, Tumit Production. Hetta felag hevur áður framleitt væl umtókta filmin Hinnarik, sum er vístur í nógvum londum.

Nú roynir Malik seg við fyrsta grønlendska actionræðufilminum.

### Á lívi

Filmurin snýr seg um seks ungar nýklaktar studentar sum fara í eina smáttu, ið liggur beint við fjørðin.

So líðandi byrja tey at uppliva løgnar hendingar, samstundis sum ótryggleikin breiðir seg, og brádliga kemur ein qivittoq – ein sonevndur fjallgangari - á gátt.

Stóri spurningurin er, hvussu mong teirra koma til hús aftur á lívi. Tað gevur filmurin sítt svar uppá.

Bæði royndir og nýggir leikarar eru við í filminum, sum varð innspældur eftir níggju vikum, og kostaði 2 mió krónur at gera.

Fyrsta sýningin av filminum verður fríggjadagin 3. juni.



BYGDASKÚLI

*Grønlendsku bygdaskúlarnir skulu styrkjast, so enn fleiri ungdómar fáa eitt grundarlag at fáa sær eina útbúgving*

# Bygdabørnini skulu fáa betri ummæli

**Alt ov nógv bygdabørn hava ikki nóg stóran kunnleika til at kunna gjøgnumføra eina útbúgving. Men nú skal vend koma í.**

Snorri Brend

Børn av bygd og børn úr útjaðaranum í 9. flokki skulu í framtíðini sendast á eftirskúla.

Hetta skal gerast fyri at tryggja, at øll fáa møguleika at fáa sær eina útbúgving.

Soleiðis verður lagt upp til í eini frágreiðing um framtíðar skúlaskapin í Grønlandi. Og her verður ikki spart uppá krútið:

Tað eru ov nógv børn og ung, sum í fólkaskúlanum ikki fáa tann neyðuga kunnleikan at kunna byrja eina útbúgving.

### Trupult

Tað eru serliga børn frá bygdunum og útjaðaranum, sum merkja hetta:

Undirvísingini í lærugreinunum danskt, enskt og støddfrøði er ikki nóg góð, verður sagt.

– Ja, støðan er alt annað enn góð, verður sagt.

Nú ætlar grønlendska landsstýrið at gera nakað álvarsamt og ítøkiligt við trupulleikan. Og her er nóg mikið at fara í holt við.

Hagtølini vísa, at 70 prosent av teimum, sum fingu prógv frá einum eftirskúla í fjør, eru farin undir eina útbúgving.

Sambært ætlanini "Regional Udviklingsstrategi" skal møguleiki verða fyri at stovna eftirskúlar frá 9. flokki í kommunum kring landið.

Eftir ætlan verður eitt uppskot um hetta langt fyri politiska myndugleikan í heyst.

# Fleiri kvinnur í leiðandi størv

**ARBEIÐSMARKNAÐUR** **Tað stendur ikki ov væl til við kvinnum í leiðandi størvum í Grønlandi. Og tá er eingin munur á almennum fyritøkum ella privatum fyritøkum.**

Snorri Brend

Veruleikin er, at tað bert eru 25 prosent kvinnur í nevndum, meðan bert 15 prosent í leiðslunum eru kvinnur.

Hetta ætlar ein nú at gera nakað við. Tí varð skipað fyri einum fundi í farnu viku, við tí endamáli at seta fokus á henda skeivleikan.

"Grønland hevur snøgt sagt ikki ráð at síggja burtur frá einum so stórum parti av talentmassa, tá ein skal finna leiðarar og nevndarlimir í framtíðini", stendur at lesa í einum skrivi frá Departementet for Sociale anliggender og CSR Greenland.

Kring allan heimin verður arbeitt við hesum spurninginum, tí fólk hugsa, at tað bæði eru samfelagsligir og handilsligir fyrimunir við hesum.

Á fundinum týsdagin var fokus sett á tey amboðini ið kvinnur hava fyri at røkka hesum máli.

